Skriv til Rættarnevndina 28.03.2023

Niðanfyri eru fleiri viðmerkingar frá Føroya Óðalsfelag til lógaruppskotið um náttúruvernd, saman við eini inniligari áheitan, um at bjóða okkum til eina hoyring í Rættarnevndini.

Sitandi samgonga legði seinasta fríggjadag fram uppskot um náttúruvernd. Uppskotið líkist rættiliga nógv tí uppskotinum um náttúruvernd, sum undanfarna samgonga legði fram, og sum datt burtur í fjør.

Uppskotið er týtt úr einari norskari lóg, sum eitur Lov om forvaltning av naturens mangfold. Her fara vit at vísa á, at rættarskipanin í Noregi als ikki er tann sama sum í Føroyum og í Danmark. Somuleiðis fara vit at vísa á, at í Føroyum hava vit øðrvísi jarðarviðurskifti enn í Noregi. Til dømis hevur seyðurin í Føroyum atgongd til alla uttangarðsjørðina alt árið og rætt til vetrarbit av innangarðsjørðini vetrarhálvuna. Í Noregi er stórur partur av lendinum skógur og hálendi, meðan ein lítil prosentpartur er landbúnaðarøki. Hetta kann ikki samanberast.

Galdandi jarðarlóggávur í Føroyum byggja á gamla, føroyska siðvenju. Øll umsiting av uttangarðsjørðini hjá ognarfólki og festibóndunum í verandi lóggávu byggir á jarðarlógirnar frá 1937 og frameftir. Við fyrimynd í líknandi lógum heilt aftur til landnámstíðina.

Vit hava eina grundlóg sum verjir ognarrættin. Allir hagapartar, umleið 400 til 500 í tali, eru matrikuleraðir. Í øllum høgunum fyriliggur ein matrikuldómur, sum staðfestir ognarrættin hjá ognarfólki í teimum einstøku høgunum. Hjá tí almenna hevur Búnaðarstovan fingið tinglýstan matrikuldóm, meðan festibrøvini hjá festarunum eru tinglýst sum byrður á ognirnar í teimum einstøku høgunum.

Í sambandi við uppskotið um náttúruvernd, sum var til viðgerðar í fjør, varð nógv skrivað um hetta mál.

Uppskotið um náttúruvernd leggur upp til, at landsstýrismaðurin fær víðfevndar heimildir við nógvum ymiskum atlitum sum nevnt í §1 í lógaruppskotinum. Verndarøkini, sum talan er um, eru á landi, áum, vøtnum, ósum og løkum og á sjónum. Endamálið við at útleggja til verndarøki byggir á nógv ymisk atlit. Talan er ikki bara um at verja kykt, plantur og djóralív, men talan kann eisini vera um útleggja verndarøki, sum hava mentanarligt ella upplivingarligt virði ella eru samleikaskapandi. Upp í landslagið verða eisini tald mentanarminnir, sum gera sítt til at geva landslagnum tess sereyðkennir.

Landsstýrismaðurin fær heimild til at gera undantøk frá eini verndarkunngerð, um tað ikki er ímóti endamálinum við verndini og ikki kann ávirka verndarvirðini nevnivert, ella um trygdarfyrilit ella fyrilit fyri týðandi samfelagsáhugamálum gera tað neyðugt.

Tað er sera umráðandi, at tit, ið skulu taka støðu til uppskotið, ið hevur sín uppruna í einari norskari lóg og norskum jarðarviðurskiftum, gera tykkum greitt, hvørjar avleiðingar tað fær fyri galdandi føroysku jarðarlóggávur. Somuleiðis skulu tit gera tykkum greitt, hvørjar avleiðingar uppskotið hevur fyri seyðahaldsraksturin og annan landbúnaðarrakstur. Her eru alt ov nógvar ógreiður, og ósvaraðir spurningar.

Sambært upplýsingum, sum vit hava fingið, hevur náttúrufriðingarnevndin tikið atlit til landbúnaðin, og hevur ongantíð friðað øki uttangarðs fyri seyð.

Uppskotið til náttúruvernd leggur upp til, at landsstýrismaðurin fær heimild við verndarkunngerð at útleggja øki soleiðis, at tey verða hegnað inni, so seyðurin ikki sleppur framat. Hetta verður gjørt fyri at verja plantulív við meira. Avleiðingin av hesum verður, at seyðatalið minkar, og at ongin eigari kann longur kenna seg tryggan, tí hann veit ongantíð nær ein nýggj kunngerð kemur, sum leggur part av hansara haga um til verndarøki. Longu av hesum orsøkum fellur søluvirði av øllum høgum í Føroyum, tí ótryggleikin av lógini um náttúruvernd fer at hava við sær, at jarðarkeyparar halda seg aftur.

Ein onnur sera týðandi avleiðing er, at ræðisrætturin at umsita hagarnar verður fluttur frá tí lokala økinum til almennar fulltrúar at umsita. Hetta er eitt stórt aftustig fyri tey lokalu bygdasamfeløgini, og fyri aldargomlu staðbundnu óðalsmentanina. Tá eitt øki verður útlagt til verndarøki, missa jarðareigararnir ræðisrættin á sínum egna haga. Hvør hagi í Føroyum hevur sína egnu siðvenju. Tað merkir, at ongin dugir at umsita hagarnar so væl og so burðardygt sum tey, sum eiga og kenna sín egna haga. Tey hava fingið frálæru í at umsita jørðina burðardygt frá sínum forfedrum, og tí er sera óheppið, at hesin ræðisrættur verður tikin frá teimum og latin einum tilvildarligum fulltrúa, sum bara hevur teoretiska vitan og einki innlit hevur í lokalu viðurskiftini í teimum einstøku høgunum.

Hyggja vit eftir, hvussu uppskotið um náttúruvernd fer at ávirka galdandi jarðarlóggávur, so kunnu vit staðfesta, at:

Eftir Lov for Færøerne om Haugers Styrelse og Drift frá 1937 hava eigararnir av høgunum ræðisrættin til felagshagarnar. Hægsti myndugleiki í haganum er hagastevnan, sum er at meta sum ein aðalfundur í einum partafelagi. Hagastevnan velur eitt hagastýri at taka sær av tí vanliga rakstrinum, og tað er meta sum ein nevnd í einum partafelagi. Síðani velur hagastevnan ella hagastýrið ein røktingarmann til at taka sær av seyðinum og seyðahaldinum. Tað er greitt, at um partur av slíkum haga verður útlagdur til verndarøki, missir hagin ræðisrættin og bitisrættin hjá seyði, gæs og rossum at ganga í slíkum verndarøkjum, sum verða innhegnað. Ongin áseting er um, hvør skal seta hegnið upp rundan um verndarøkið, ella hvør skal halda hegnið við líka og reka av seyð, sum er komin inn á verndarøkið. Eisini vita vit, at í stórkava verður sera trupult at halda hart trongda seyðinum burtur frá verndarøkjum.

Í Lov om Benyttelse af Grandestævne frá 1937 eru týdningarmiklar ásetingar um, hvussu trætur um jarðarviðurskifti verða loystar. Lógaruppskotið um náttúruvernd kann kolldøma hesa lóg, um so er, at talan er um verndarøki. Tað vil siga, at avgerðarrætturin verður fluttur frá tí lokala samfelagnum til almennu umsitingina.

Í Lov om Benyttelse af Indsøer og Vandløb frá 1937 er ásett í §1, at jarðareigarin hevur ræðisrættin til vatnið í vøtnum, áum ella áarløkum, sum eru í tí einstaka haganum. Um so er, at vøtn, áir ella áarløkar verða løgd til verndarøki, verður ræðisrætturin fluttur frá tí lokala samfelagnum til almennu umsitingina.

Í Lov om Vandledningar frá 1909 er ásett, at jarðareigarin hevur ræðisrættin til vatnið, men at hann má tola, at kommunan tekur vatn úr ánni til drekkivatn. Um so er, at slíkar áir verða

útlagdar sum verndarøki, verður ræðisrætturin fluttur frá tí lokala samfelagnum til almennu umsitingina.

Í § 41 í Lov um Hegn og Markfred frá 1937 er ásett, at ongin hevur rætt til at fara av bygdargøtum uttan loyvi frá haganum. Um so er, at øki verða útløgd til verndarøki, verður ræðisrætturin fluttur frá eigaranum til almennu fyrisitingina.

Í galdandi lóggávu hava vit lokalar friðingarnevndir, lokalar landbúðanarstevnur og lokalar útskiftingarnevndir. Friðingarnevndir taka sær av náttúruvernd og náttúrufriðing. Sýslumaðurin saman við lokalum umboðum sita í friðingarnevndini. Avgerðir hjá friðingarnevndini kunnu kærast til yvirfriðingarnevndina, har sorinskrivarin er føddur formaður. Avgerðir hjá yvirfriðingarnevndini kunnu ikki kærast. Viðmerkjast skal, at friðingarnevndin ongantíð hevur gjørt seg inn á raksturin av seyðahaldinum ella landbúnaðarraksturin, soleiðis at skilja, at tað hevur ongantíð verið talan um at innhegnað eitt friðað øki fyri seyði.

Tá ið talan er um útskifting, er tað sama galdandi. Vit hava eina útskiftingarnevnd og eina yvirútskiftingarnevnd.

Eru trætumál um landbúnaðarviðurskifti, hava jarðareigararnir møguleika at lata ta lokalu landbúnaðarstevnuna avgera málið. Møguleiki er at kæra málið til yvirlandbúnaðarstevnuna undir somu fortreytum sum í friðingar- og útskiftingarmálum. Tað vil siga, at avgerðin hjá yvirlandbúnaðarstevnuni er endalig.

Um so er, at lógaruppskotið um náttúruvernd verður samtykt, so kann landsstýrismaðurin púra einsamallur og uttan at venda sær til nakra lokala nevnd ella yvirfriðingarnevnd áseta, at eitt øki skal vera verndarøki. Er ein jarðareigari ónøgdur við, at eitt øki verður útlagt til verndarøki, hevur hann í fyrstu atløgu bara møguleika at kæra til landsstýrismannin og síðani til Kærustovnin uttan at fáa nakra endaliga avgerð.

Tá ið jarðareigarin er tann fíggjarliga veikari parturin, er trupult hjá honum at fara í Føroya rætt við einum slíkum máli, sum ofta er sera víðfevnt og kostnaðarmikið.

Eitt annað, sum eisini hevur stóran týdning í hesum máli, er, at lógaruppskotið til náttúruvernd roynir at skerja møguleikarnar hjá jarðareigarunum at krevja endurgjald fyri øki, sum eru útløgd til verndarøki. Her er okkara fatan, at tað ikki ber til at lóggeva seg uttanum vanligu óskrivaðu reglurnar um endurgjald.

Tá ið uppskotið byggir á norska lóg og norska rættarskipan, eru revsireglurnar neyvan tær somu, sum vit brúka í Føroyum. Eisini verður víst á, at lógaruppskotið er ikki skrivað á vanligum lógarmáli, men við nógvum fakligum hugtøkum, sum eru sera trupul at avmarka og kunnu hava nógvar tulkingartrupulleikar við sær.

Víst verður eisini á, at í dag hava ferðavinnan og alivinnan stór fíggjarlig áhugamál at sleppa framat høgunum, sum ognarfólk eiga. Ofta verður ognarrætturin, sum øll okkara rættarskipan byggir á, als ikki virdur. Og trýstið er longu stórt. Men við hesum lógaruppskotinum verður ruðuleikin fullkomin.

Í §29 í lógaruppskotinum um náttúruvernd er ásett, at landsstýrismaðurin kann gera undantøk til kunngerðina um verndarøki, um talan er um týðandi samfelagslig atlit. Tað er neyvan nakar ivi um, at tá ið verndarkunngerðin er komin í gildi, og ræðisrætturin harvið er tikin frá jarðareigarunum og latin tí almenna, so verður eitt stórt trýst frá ferðavinnuni og alivinnuni á hendan einstaka landsstýrismannin. Bæði ferðavinnan og alivinnan vilja grundgeva við, at tey skulu hava undantak frá kunngerðini, tí talan er um týðandi samfelagslig atlit. Tað merkir, at so sleppa hesar vinnur uttanum jarðarlóggávuna og ræðisrættin hjá eigarunum, sum er galdandi í dag.

Omanfyri nevndu, og fleiri onnur álvarsom viðurskifti, hava vit sum felag og fakkunnleiki, tørv á at greiða tykkum frá. Vit ganga út frá at tit, eins og vit, fegin vilja hava eina góða náttúruverndarlóg, sum fyrst og fremst ger tað sum hon sigur, verjir náttúruna.

Til tess at røkka hesum, meta vit tað alneyðugt at tit taka tykkum stundir at samskifta við okkum væl og virðiliga, áðrenn nøkur niðurstøða verður gjørd, og nakað nevndarálit verður skrivað.

Føroya Óðalsfelag hevur nøkur góð boð uppá hvussu hetta lógaruppskotið til náttúruvernd kann lagast til tað betra, og vilja vit tí fegin koma á tal við tykkum, til tess at umrøða ítøkiligar broytingar.

Vit vóna at frætta frá tykkum, um ein hoyringsfund í Rættarnevndini.

Vegna Stýrið,

Niels T. Pedersen
Føroya Óðalsfelag

FØROYA
ÓÐALSFELAG